Búnaðargrunnurin

Ársroknskapur fyri 2017

Frumrit

Staravegur 17 · Postboks 3258
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands

Telefon +298 34 34 34
Telefax +298 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Sp/f. no. 2732

Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um grunnin 2

Leiðslufrágreiðing 4

Roknskaparátekning leiðslunnar 8

Átekning frá óheftum grannskoðara 9

Nýttar roknskaparreglur 11

Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 15

Fíggjarstøða 31. desember 16

Notur 18

Upplýsingar um grunnin

Búnaðargrunnurin
Postboks 50
R. C. Effersøesgøta 4
110 Tórshavn

Telefon: 35 35 80
Telefaks: 35 35 81

Roknskaparár nr. 13

Heimstaður: Tórshavn

Stýrið

Valdir limir:

Rannvá B. Magnusen, formaður
løgfrøðingur

Símun Gullaksen, næstformaður
bóndi

Una Joensen
búskaparfrøðingur

Rani Slættanes
sølu- og innkeypsleiðari

Niels Winther Poulsen
løgfrøðingur

Varalimir:

Birta Biskopstø
løgfrøðingur

Eynar Martin Kjærbo
bóndi

Esther Dahl
cand.negot.

Dánial Christoffersen
fíggjarleiðari

Christian Danielsen
búskaparfrøðingur

Stjórn

Regin I. Jakobsen

Upplýsingar um grunnin

Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Peningastovnar

Bank Nordik
Eik Banki
Norðoya Sparikassi
Suðuroyar Sparikassi
PP Capital
Skandinaviska Enskilda Banken

Leiðslufrágreiðing

Virksemi

Endamál Búnaðargrunsins er at veita fígging til menning av føroyskum landbúnaði og at fíggja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina (Búnaðarstovuna), sambært løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 22. mai 2015.

Herumframt umsitur grunnurin festikontur, felags festipuljuna og kontur fyri mist vetrarbit og stendur fyri allari innkrevjing av festileigum, traðarleigum og øðrum leigum.

Ársúrslit

Inntøkurnar í 2017 eru 8.604 tkr. móti 9.055 tkr. árið fyri, og er hetta ein lækking upp á 451 tkr. Rentuinntøkur av útlánum vóru 3.728 tkr., av lánsbrøvum og avtaluinnlánum var eitt avlop á 4.312 tkr. og rentuinntøkurnar av innistandandi vóru um 300 kr.

Rentuinntøkurnar av útlánum lækkaðu við 556 tkr. Inntøkurnar av lánsbrøvum og avtaluinnlánum hækkaðu við 203 tkr., meðan rentuinntøkurnar av innistandandi peningi lækkaðu við 1 tkr.

Lækkingin í inntøkunum stavar sostatt í høvuðsheitinum frá minkaðum rentuinntøkum av útlánum, tó at vøksturin í avlopinum av lánsbrøvum sjálvsagt eisini merkist.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar fyri 2017 vórðu 7.149 tkr., sum eru 576 tkr. minni enn fyri 2016, tá talan var um 7.725 tkr. Høvuðsorsøkin til útreiðsluminkingina er ein lækking í kostnaðinum av jarðarumsiting landsins á Búnaðarstovuni í Kollafirði á 600 tkr.

Úrslitið aftaná avskrivingar og avsetingar móti tapi uppá skuldarar gjørdist eitt avlop á 3.648 tkr. fyri 2017 í mun til eitt hall á 47 tkr. fyri 2016. Hetta stavar frá omanfyri nevndu broytingum, umframt at netto eru inntøkuførdar 2.193 tkr. í avsetingum til væntað tap upp á útlán.

Útlánini eru hækkað við 346 tkr., úr 87.334 tkr. upp í 87.680 tkr., og stavar henda broyting frá eini lækking í útlánum upp á 6.068 tkr., samstundis sum avsetingin ímóti tapum er minkað við 6.414 tkr.

Rentur og kursjavningar av lánsbrøvum góvu eitt avlop á 4.312 tkr. í 2017 í mun til 4.109 tkr. í avlopi fyri 2016. Talan er sum nevnt um eina hækking á góðar 200 tkr. Virðisbrævamarknaðurin verður framvegis mettur sera avbjóðandi við metlágum rentustigi. Enn er henda gongd ikki reiðiliga vend, og hevur hon havt fallandi virðisbrævakursir við sær. Fyri at bøta um avkastið av virðisbrøvum og minka um váðan tók grunnurin í 2016 tí stig til at spjaða íløgurnar nakað meira, og aftur í 2017 varð eitt stig tikið á somu leið. Sigast kann, at hetta higartil hevur hepnast toluliga væl. Eftir øllum at døma verður 2018 enn eitt avbjóðandi ár viðvíkjandi íløgum í virðisbrøv.

Annars kann í hesum sambandi viðmerkjast, at ein av minni hepnu íløgunum hjá grunninum í síni tíð varð gjørd í virðisbrøv, sum amerikanska stórfyritøkan Lehman Brothers stóð aftanfyri. Lehman Brothers fór av knóranum í 2010 og var trygdin tískil burtur. Hóast hetta eru nú umleið tveir triðingar av íløguni komnir inn aftur, og framvegis kemur peningur inn hesum viðvíkjandi.

Verður hugt at talvunum niðanfyri kann sigast, at tað samanumtikið hevur verið ein skilagóð loysn at gera íløgur í virðisbrøv, bæði tá ið hugsað verður um avkast og trygd. Talvurnar vísa gongdina á lánsbrøvum frá byrjan í 2001 til árslok 2017.





- Innlán (reyður litur) svarar til at peningurin varð settur á innlánskontur, við hægst møguligari rentu til eina og hvørja tíð, ella tað sum eisini kallast DK Repo renta.
- Effas 1 – 5 (bláur litur) svarar til lánsbrævamarknaðin, ella eitt sokallað indeks, sum íløgur grunsins í virðisbrøv vera samanhildin við.

- Ognarrøkt (grønur litur) eru virðisbrøvini hjá Búnaðargrunninum.

Ovara myndin vísir rentuna p.a. fyri hvørt árið sær frá 2001 til 2017 og miðal rentuna fyri tíðarskeiðið. DK Repo rentan hevur í miðal givið 1,81%, meðan virðisbrøvini hava givið 3,12% í miðal fyri tíðarskeiðið.

Niðara myndin vísir eina samanlegging (akkumulering) av, hvussu nógvar krónur hvørt virðisbræv á 100 kr. hevur kastað av sær fyri árini 2001 til 2016. T.v.s. at virðisbrøvini hava givið 68,04 kr. fyri hvørjar 100 kr., meðan DK Repo hevði givið 35,31 kr. fyri hvørjar 100 kr. í sama tíðarskeiði.

Grunnurin er vaksin úr 101,3 mió.kr. upp í 105,0 mió.kr. og stavar munurin frá rakstrarúrslitinum.

Festikontan er vaksin úr 146,0 mió.kr. upp í 147,1 mió.kr. Høvuðsorsøkin til hækkingina á 1,1 mió.kr. er at finna í sølu av almennari jørð fyri 7,6 mió.kr. Endurgjald frá Landsverki fevndi fyri 2017 um 1,2 mió.kr. Hinvegin eru 8,9 mió.kr. fluttar til felags festipulju. Her skal viðmerkjast, at nakað er játtað av festikontu til verkætlanir, sum eru í gerð í løtuni, og vera útgoldnar festarum so hvørt arbeiðið verður framt.

Viðmerkjast skal, at av nevndu 147,1 mió.kr. hoyra 11,5 mió.kr. til kontu fyri mist vetrarbit. Til hetta er at viðmerkja, at lógin fyri vetrarbit er broytt í mai 2009, soleiðis at mist bit fyri ognarhagar ikki longur verður goldið á kontu í Búnaðargrunninum, men beinleiðis til eigaran. Umframt hetta er lógin broytt soleiðis, at tann parturin, sum hoyrir til landsjørð, hevur fingið aðrar treytir fyri at fáa pening útgoldnan.

Hendan lógarbroyting hevur við sær, at tað ikki verður goldin eins nógvur peningur á kontu í Búnaðargrunninum fyri mist vetrarbit í framtíðini, sum undanfarin ár. Roknast kann eisini við størri útgjaldingum av kontu fyri mist vetrarbit komandi árini.

Umframt hetta kann nevnast, at sambært løgtingslóg nr. 66 frá 26. mai 2011 um broyting í løgtingslóg um Búnaðargrunn eru nú fluttar 47,9 mió.kr. til felags festipulju. Fyri árið 2017 vórðu sum nevnt fluttar 8,9 mió.kr. av festikontu til felags festipuljuna.

Mett verður, at hendan broytingin í størri mun kann koma øllum landbúnaðinum í landinum at gagni, við tað at eisini festarar í útjaðaranum, har ofta einki er á festikonto, eisini fáa møguleikan at søkja um fígging av felagspuljuni. Hetta er nakað sum er staðfest seinasta árini, nú fleiri áhugaverdar verkætlanir verða gjøgnumførdar meðan aðrar eru í umbúna. Eisini betrar felags festipuljan um møguleikarnar at velta, ikki minst hjá mjólkarframleiðarunum.

Í 2013 vórðu sambært lóg játtaðar úr Búnaðargrunninum 24,7 mió.kr. yvir 6 ár, ella 4,1 mió.kr. um árið til studning til egið framleitt stráfóður. Hetta fyri at stuðla undir fóðurframleiðsluna og fyri at minka um útreiðslurnar til keypt fóður hjá bóndunum. Játtanin minkar um fæ grunsins, men eigur at betra um raksturin hjá mjólkarframleiðarunum.

Afturat hesum eru í 2013 sambært somu lóg játtaðar 5,1 mió.kr. úr grunninum til bráðneyðugar ábøtur á bygningar hjá Búnaðarstovuni í Kollafirði. Hóast hesar ábøtur tá vórðu mettar átroðkandi er einki brúkt av avsetingini enn, og átti henda eftir Búnaðargrunsins bestu sannføring at verið førd aftur. Sum skilst eru fleiri av ábótunum gjørdar og fíggjaðar tann veg slíkar eiga at verða, nevniliga umvegis viðlíkahaldskontuna hjá Landsverki, sum tekur sær av viðlíkahaldi av landsins bygningum.

Umframt omanfyristandandi vórðu 6 mió.kr. settar av til tjóðargarðsætlanina í Koltri. Hesar eru seinni býttar sundur í 5 mió.kr. til antikvariska serskipan og 1 mió.kr. til serføroysk húsdjór. Ilt er at síggja, hvat antikvarisk serskipan hevur við landbúnað at gera, og harvið hví peningur verður tikin úr Búnaðargrunninum at fíggja hesa.

Hesar 35,8 mió.kr. eru játtaðar beinleiðis av fæi Búnaðargrunsins og minka alt annað líka um inntøkumøguleikarnar hjá grunninum, ella hækka um útlánsrentuna, um avkastið skal vera tað sama, sum áðrenn játtanina, eins og grundarlagið fyri at hjálpa landbúnaðinum versnar samsvarandi.

Sama er galdandi viðvíkjandi lógarløgdu skyldu grunsins at rinda fyri kostnaðin av at reka jarðarumsitingina. Á hvørjum ári verða rindaðar slakar 3 mió.kr. hesum viðvíkjandi, ikki minni enn góðar 3,5 mió.kr. fyri 2016; peningur, sum verður tikin av fæi grunsins, og so ella so frá landbúnaðinum. Síðani grunnurin varð settur á stovn eru soleiðis nýttar 36,3 av fæi grunsins til at rinda fyri jarðarumsitingina. Hetta er peningur, sum betri hevði kunnað dugnað landbúnaðinum beinleiðis.

Fíggjarjavni

Fíggjarjavnin við árslok er 317.771 tkr. Av hesum er eginpeningurin 300.019 tkr., sum svarar til 94,4%.

Roknskaparátekning leiðslunnar

Stýrið og stjórnin hava í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina fyri Búnaðargrunnin fyri 2017.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok 2017.

Harumframt meta vit, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar.

Tórshavn, hin 4. apríl 2018

Stjórn:

Regin I. Jakobsen

Stýrið:

Rannvá B. Magnussen
formaður

Símun Gullaksen
næstformaður

Una Joensen

Rani Slættanes

Niels Winther Poulsen

Góðkendur á fundi stýrisins, hin 4/4 2018

Fundarstjóri:

Átekning frá óheftum grannskoðara

Til stýrið í Búnaðargrunninum

Átekning á ársroknskapin
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Búnaðargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2017 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum gevur eina rætta mynd í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Ábyrgd grannskoðarans
Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðararlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at grunnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparháttur, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

Átekning frá óheftum grannskoðara

Niðurstøða
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin fyri 2017 hjá Búnaðargrunninum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

Tórshavn, hin 4. apríl 2018
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
statsaut. revisor

Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri Búnaðargrunnin fyri 2017 er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.", tó soleiðis, at niðurskrivingar móti væntaðum tapum upp á útlán eru viðgjørdar samsvarandi reglunum fyri peningastovnar.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár.

Um innrokning og virðisáseting í ársroknskapinum

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Roknskaparligar metingar

Virðisásetingin av útlánum grunsins er tengd at metingum hjá leiðsluni um hvørja ávirkan framtíðar hendingar kunnu hava á virðið á útlánum.

Metingarnar hjá leiðsluni eru gjørdar við støði í teimum royndum, sum leiðslan hevur við lánsveiting til ymsar bólkar av lántakarum umframt fyritreytum, sum leiðslan eftir umstøðunum metir verða ráðiligar, men sum eru óvissar og torførar at siga nakað um.

Um fyritreytirnar, sum metingarnar byggja á, broytast ella um grunnurin fær nýggja vitan um ávís øki, kann tað fáa ávirkan á uppgerðina av roknskaparliga virðinum.

Rakstrarroknskapur

Inntøkur

Leiguinntøkur og rentur av lánum verða inntøkuførdar sambært útsendum rokningum.

Rentur av innistandandi peningi verða inntøkuførdar, tá ið tær verða tilskrivaðar í peningastovnum.

Rentur av virðisbrøvum verða tíðargreinaðar til og við roknskaparárslok.

Útreiðslur

Útreiðslur verða tiknar við í tí roknskapartíðarskeiði tær viðvíkja.

Nýttar roknskaparreglur

Skattur av ársúrslitinum

Skattur av ársúrslitinum fevnir um skatt at gjalda og broyting í útsettum skatti. Skattur, sum viðvíkur ársúrslitinum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin og skattur, sum viðvíkur bókingum á eginognini, verður innroknaður beinleiðis á eginognina.

Fíggjarstøðan

Materiell støðisogn

Keyp av materiellari støðisogn verður útreiðsluførd í útveganarárinum.

Útlán og eftirstøður

Útlán verða virðisásett til amortiseraðan kostprís.

Niðurskrivingar verða gjørdar ímóti væntaðum tapum, tá ið tað fyriliggja óvildugar ábendingar um, at eitt útlán ella ein bólkur av útlánum eru lækkað í virði.

Eru óvildugar ábendingar um at eitt einstakt útlán er lækkað í virði, verður lánið niðurskrivað.

Fyri útlán, har tað ikki finnast óvildugar ábendingar um virðislækking fyri hvørt útlán sær, verður mett um niðurskrivingartørvin fyri samlaða bólkin og niðurskrivingartestir verða gjørdar við støði í væntaðum peningastreymum framyvir og við støði í staðfestum tapsroyndum fyri einstaka bólkin. Bólkingin av útlánum tekur fyrst og fremst støði í vinnugrein og lániváða.

Óvildugar ábendingar um virðislækkingar kunnu m.a. vera eftirstøða, versnandi rakstrarúrslit. minkandi tilfeingi og/ella niðurgongd innan ávísar vinnugreinar.

Niðurskrivingarnar verða gjørdar upp sum munurin ímillum tað roknskaparliga virðið á útlánunum og nútíðarvirði av forvæntaðum peningastreymum, herímillum realisatiónsvirðið av møguligum trygdarveitingum. Sum diskonteringsatsur verður tann effektiva rentan, sum er ásett fyri roknskapartíðarskeiðið, nýtt til útrokning av nútíðarvirðinum.

Niðurskriving til tap verður bókað á eina "korrektiv" konto, sum verður mótroknað útlánunum. Broytingar í "korrektiv" konto verða innroknaðar í rakstrinum undir "Niðurskriving uppá útlán og staðfest tap". Vísir tað seg seinni. at virðislækkingin ikki er varandi, verður niðurskrivingin afturført yvir somu konto.

Verður staðfest, at eitt lán ikki kann afturgjaldast, verður lánið endaliga avskrivað yvir "korrektiv" konto.

Nýttar roknskaparreglur

Ognir í fyribils varðveitslu

Ognir í fyribils varðveitslu eru ítøkiligar ognir, sum eru yvirtiknar orsakað av misrøktum lániavtalum.

Ognir í fyribils varðveitslu verða í fyrstu atløgu innroknaðar til dagsvirði, tá hesar eru yvirtiknar. Eftirfylgjandi eru hesar virðisásettar til lægru upphæddina av roknskaparligum virði og dagsvirði við frádrátti av møguligum sølukostnaði.

Inntøkur ella tap, sum stava frá niðurskrivingum uppá ognir í fyribils varðveitslu, verða tiknar við í rakstrinum.

Onnur áogn

Onnur áogn verður upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskrivingum ímóti tapi

Virðisbrøv

Virðisbrøv verða upptikin til kursvirði við ársenda.

Festikontur, felags festipulja og kolagrevstrargrunnurin

Inn- og útgjøld av festikontum, felags festipulju og kolagrevstrargrunninum verða innroknað beinleiðis undir nevndu kontur, sum eru bólkaðar undir eginogn grunsins.

Skyldugur skattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku javnað fyri skatt frá skattskyldugu inntøkuni fyri undanfarin ár.

Útsettur skattur verður uppgjørdur eftir fíggjarstøðu skuldarháttinum av fyribils munum millum roknskaparligu og skattligu virðini av ognum og skyldum, gjørd upp við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini ávikavist afturgjaldan av skylduni.

Útsett skattaáogn, íroknað skattliga virðið av framflytingarheimilaðum skattligum halli, verður uppgjørd til tað virði, sum áognin verður mett at kunna realiserast til, antin við javnaði av skatting av framtíðar vinningi ella við mótrokning av útsettum skattaskyldum.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum við galdandi lóg fíggjarstøðudagin verða galdandi, tá ið tann útsetti skatturin væntandi skal gjaldast. Í teimum førum at skattliga virðið kann gerast upp eftir ymsum skattareglum, verður útsettur skattur virðisásettur við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini ávikavist gjalding av skylduni.

Nýttar roknskaparreglur

Broytingar í útsettum skatti, sum standast av broytingum í skattasatsi, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin. Nýtti skattasatsurin í hesum ári er 18%

Skuld

Skuld verður upptikin til áljóðandi virði.

Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember

	Nota	2017	2016
		kr.	kr.
Leiguinntøkur, netto	1	222.530	195.140
Rentuinntøkur v.m.	2	8.040.599	8.394.881
Sakarmálsgjøld		340.812	465.094
Inntøkur til samans		8.603.941	9.055.115
Umsiting	3	-894.658	-850.906
Húsarakstur	4	-230.090	-198.629
Starvsfólkaútreiðslur	5	-3.093.580	-3.074.522
Innbúgv v.m.	6	0	-1.638
Rakstur av ognum í fyribils varðveitslu	7	9.145	-59.349
Búnaðarstovan		-2.940.000	-3.540.000
Úrslit áðrenn avsetingar		1.454.758	1.330.071
Niðurskriving til tap upp á útlán og staðfest tap	8	2.193.151	-1.377.202
Úrslit áðrenn skatt		3.647.909	-47.131
Skattur av ársúrslitinum		0	0
Ársúrslit		3.647.909	-47.131

Fíggjarstøða 31. desember

	Nota	2017	2016
		kr.	kr.
OGN			
Ogn í umferð			
Áogn			
Útlán og niðurskriving til tap	9	87.679.502	87.333.647
Onnur áogn	10	2.923.247	6.563.986
Ognir í fyribils varðveitslu		0	1.200.000
		90.602.749	95.097.633
Virðisbrøv		205.720.755	182.339.502
Tøkur peningur	11	21.447.216	31.519.838
Ogn í umferð til samans		317.770.720	308.956.973
OGN TIL SAMANS		317.770.720	308.956.973

Fíggjarstøða 31. desember

	Nota	2017	2016
		kr.	kr.
SKYLDUR			
Eginogn			
Grunnurin	12	104.966.739	101.318.830
Festikontur	13	147.128.858	146.024.117
Felags festipulja	14	47.907.070	39.568.368
Kolagrevstrargrunnurin		16.803	16.803
Eginogn til samans		300.019.470	286.928.118
Skuld			
Stuttfreistað skuld			
Kreditorskuld		82.000	40.000
Onnur skuld	15	17.669.250	21.988.855
Skuld til samans		17.751.250	22.028.855
SKYLDUR TIL SAMANS		317.770.720	308.956.973
Veðsetingar og trygdarveitingar	16		
Eventualognir	17		

Notur

1 Leiguinntøkur

	2017	2016
	kr.	kr.
Festileiga	24.370	30.409
Traðarleiga	139.160	139.731
Festigjøld við skifti	58.000	25.000
Leiga av lendi	1.000	0
	222.530	195.140

2 Rentuinntøkur v.m.

Rentur av útlánum	3.256.294	3.535.273
Rentur og kursjavningar av virðisbrøvum	4.312.041	4.109.305
Rentur av innistandandi peningi o.a.	303	1.257
Rentur av eftirstøðum	471.961	749.046
	8.040.599	8.394.881

3 Umsiting

Løgfrøðilig og serkøn hjálp	217.450	201.800
Innheintingarkostnaður	0	3.563
Postgjald	12.557	13.587
Grannskoðan	97.000	75.000
Roknskaparhjálp v.m.	27.000	25.000
Vistir	38.890	60.504
Tinglesing	7.931	12.250
Ymiskt	41.637	22.069
Námsferðir	20.789	0
Stuðul	10.000	10.000
Tryggingar	41.990	66.582
Edv-útreiðslur	209.800	165.298
Telefon	51.506	48.784
Internet	18.056	20.980
Haldaragjald, bløð o.a.	58.868	62.969
Aðrar skrivstovuútreiðslur	41.184	62.520
	894.658	850.906

Notur

4 Húsarakstur

	2017	2016
	kr.	kr.
Viðlíkahald	67.208	9.150
Reingerð o.a.	73.113	95.076
Ljós og hiti	39.177	36.771
Urtagarðurin	28.032	33.632
Kavarudding v.m.	9.360	10.800
Ávaringarskipan	13.200	13.200
	230.090	198.629

5 Starvsfólkaútreiðslur

Lønir	2.251.110	2.205.079
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur	59.035	86.676
Arbeiðsloysistrygging	39.462	29.878
Barsilsskipanin	20.104	14.829
Eftirlønargjald	311.529	318.003
Lønir og lønargjøld til samans	2.681.240	2.654.465
Samsýning, Stýrið	390.000	395.000
Ferðapeningur	22.340	25.057
	3.093.580	3.074.522

6 Innbúgv v.m.

Innbúgv	0	1.638
	0	1.638

7 Rakstur av ognum í fyribils varðveitslu

Vakstrarhúsið í Sandavági	-9.145	59.349
	-9.145	59.349

Notur

		2017	2016
		kr.	kr.
8	**Niðurskriving til tap upp á útlán og staðfest tap**		
	Staðfest tap í árinum	4.220.943	10.396.852
	Afturføring av áður framdum niðurskrivingum til tap upp á útlán	-3.998.211	-9.287.150
	Broyting í niðurskrivingum upp á verandi lán	-2.415.883	267.500
		-2.193.151	1.377.202
9	**Útlán og niðurskriving til tap**		
	Útlán	119.900.822	125.969.061
	Niðurskriving til tap	-32.221.320	-38.635.414
		87.679.502	87.333.647
10	**Onnur áogn**		
	Mvg-áogn	110.098	670.227
	Onnur áogn	2.813.149	5.893.759
		2.923.247	6.563.986
11	**Tøkur peningur**		
	Kassapeningur	319	319
	Bank Nordik	15.160.405	16.428.657
	Eik Banki	2.393.455	8.047.895
	Suðuroyar Sparikassi	718.495	716.117
	Norðoya Sparikassi	947.863	864.633
	PP Capital (Jyske Bank)	219.626	33.858
	Skandinaviska Enskilda Banken	2.007.052	5.428.359
		21.447.215	31.519.838

Notur

12 Grunnurin

	2017	2016
	kr.	kr.
Salda 1. januar	101.318.830	101.365.961
Rakstraravlop	3.647.909	-47.131
	104.966.739	101.318.830

13 Festikontur

Salda 1. januar	146.024.117	133.428.840
Søla av jørð	7.634.326	20.601.048
Inngoldið fyri vetrarbit	903.230	522.556
Inntøka av grótbrotum	575.522	557.865
Flutt til felags festipulju	-8.851.599	-8.545.678
Endurgjald frá Landsverk	1.241.723	648.620
Leiga	446.142	769.393
Alistøðir	206.498	269.987
	148.179.959	148.252.631
Nettoútgjøld	-1.051.101	-2.228.514
Festikontur 31. desember	147.128.858	146.024.117

14 Felags festipulja

Salda 1. januar	39.568.368	34.382.633
Flutt av festikontum	8.851.599	8.545.678
Útgjøld	-515.397	-3.141.263
Stuðul ridluskriðaverkætlan	2.500	-218.680
Felags festipulja 31. desember	47.907.070	39.568.368

Notur

15 Onnur skuld (stuttfreistað)

	2017	2016
	kr.	kr.
Stráfóðurstuðul	4.119.896	8.239.792
Búnaðarstovan – antikvariska serskipan í Koltri	4.026.018	4.061.297
Búnaðarstovan – serføroysk húsdjór	835.570	1.000.000
Búnaðarstovan – ábøtur á bygningar	5.147.766	5.147.766
Búnaðarstovan – rakstur	3.540.000	3.540.000
	17.669.250	21.988.855

16 Veðsetingar og trygdarveitingar

Ongar veðsetingar hvíla á grunninum. Grunnurin er partur í tveimum rættarmálum. Mett verður regluliga um hesi mál, og neyðugar avsetingar verða gjørdar, har mett verður, at vandi er fyri tapi. Mett verður ikki, at hesi rættarmál fara at hava serliga ávirkan á fíggjarligu støðu grunsins.

17 Eventualognir

Grunnurin hevur við árslok 2017 eina møguliga skattaáogn á 1.523 tkr.